# Todi hevur lykilin til 55 millionir krónur

**Brian Laudrup heldur dygdirnar hjá Toda og Zuma vera avgerandi fyri, um FCK skal megna at vinna á Glasgow Rangers**

EUROPA CUP FYRI MEISTARAR
*Jóannes Hansen*

Í fyrrakvøldið tók FCK fyrsta stigið ímóti triðja og avgerandi innleiðandi umfarinum í Europa Cup fyri meistarar. Teir vunnu 4–1 í Parkini ímóti maltesiska Sliema Wanderers. Avrikið var ikki sannførandi alla tíðina, men eingin ivi var um, at FCK var væl betri enn mótstøðuliðið, sum kortini var vandamikið í fleiri skjótálopum og kundi havt fingið fleiri mál enn tað, sum teir skoraðu tíðliga í 2. hálvleiki. Tá minkaðu teir um munin til 3–1, og FCK var skelkað eina løtu, áðrenn Thomas Røll, sum eisini hevði skorað í 1. hálvleiki, staðfesti heimasigurin, ið heilt víst var nóg stórur at røkka næsta umfarinum.

FCK skal spæla á Malta mikukvøldið. Tá verður heimaliðið meiri framrættað, enn teir vóru síðsta mikukvøld, og harvið verða møguleikarnir hjá Toda Jónsson og Zuma at gera um seg størri, enn teir vóru ímóti sera verjukenda mótstøðuliðnum. Zuma skoraði vakurt mál upp á langskot, og Todi Jónsson skoraði til 3–0, tá ið hann sneiddi framvið málverjanum og úr spískum í vinstru sendi í málið.



*Fyrrverandi stjørnuleikarin á danska landsliðnum, Brian Laudrup, sigur tað verða avgerandi fyri Champions League luttøkuna hjá FCK, at Todi Jónsson og Sibusisu Zuma spæla upp til sítt besta í dystunum ímóti Rangers.*

*Mynd: savnsmynd*

### Nógvir pengar at vinna

Í donsku fjølmiðlunum verður mett, at inntøkurnar fyri at sleppa upp í part í europeiska bólkaspælinum kunnu fara at vera umleið 55 millionir krónur, og felagið er sinnað at geva spælarunum ein stóran bita, um tað eydnast teimum at sleppa ígjøgnum nálareygað til fótbóltslandið, har øll vilja sleppa upp í part, men har tey flestu dumpa.

Einasti spælarin, sum bæði hevur spælt í FCK og í Glasgow Rangers, er Brian Laudrup. Hann heldur, at teir í FCK eiga at vera fegnir um lutakastið, at teir skulu spæla ímóti Glasgow Rangers og ikki t. d. Lazio ella Dortmund, og hann heldur, at FCK eigur at hava møguleika fyri fyrstu ferð at spæla seg í bólkamfarið.

Tá ið Brian Laudrup sammetir FCK og Glasgow Rangers, so heldur hann, at skotska meistaraliðið er væl fyri í álopspartinum, meðan hann heldur FCK vera hópin betri fyri í verjupartinum. Um FCK skal hava nakran møguleika at vinna samantalt, so skulu teir gera sær dælt av, at Glasgow Rangers ikki er so væl skipað í verjupartinum, og tá er tað, at Brian Laudrup, sum framvegis er høgt í metum í Glasgow Rangers og yvirhøvur í skotskum fótbólti, heingir vónirnar á Toda Jónsson.

– Rangers hevur nógv størri altjóða royndir enn FCK, men FCK hevur ein spælistíl, sum ber við sær, at tað er nógv torførari at gera mál ímóti teimum. Um Todi Jónsson og Sibusisu Zuma spæla upp til sítt besta í senn og í báðum dystunum, so eru avgjørdir møguleikar fyri, at FCK fer at vinna samanlagt, segði Brian Laudrup við danskar fjølmiðlar eftir lutakastið síðsta fríggjadag.

### Stórar upphæddir

Omanfyri varð nevnt, at tað verður roknað við 55 millíónum í eykainntøkum, um FCK megnar at slappa upp í part í bólkaspælinum. Hetta eru inntøkur, sum eitt nú kunnu fáast fyri atgongugjald, fyrisølu av pylsum, øli og øðrum, lýsingar, rættindini at sjónvarpa og stigapengar frá UEFA.

Ólavsøkudag visti danska blaðið BT at siga, at semja er gjørd millum leiðsluna í FCK og spælararnar um, hvussu stórur bitin av køkuni, sum spælararnir skulu fáa, skal vera, um tað eydnast so at siga at fáa fatur í køkuni.

Fyri sigur á maltesiska liðnum fáa teir átjan spælararnir, sum eru við, 50 túsund í part, og fyri samantaldan sigur á Glasgow Rangers fáa spælararnir 250 túsund í part. Einki er enn sagt um, hvussu nógv teir fara at fáa fyri hvørt stigið í bólkaspælinum, men tað er góð tíð til at tosa um tað seinni.

Ítróttarstjórin í FCK, Niels - Christian Holmstrøm, hevur eisini sagt, hvussu nógv spælararnir fara at fáa í bonus í innanlands kappingini. Fyri at vinna ein dyst fáa spælararnir fimm túsund krónur og 2.500 krónur fyri javnleik. Um FCK vinnur DM, fáa teir spælararnir, sum hava verið við í tveimum triðingum av dystunum 120 túsund krónur eyka. Um henda skipanin hevði verið galdandi í fjør, so høvdu Todi og hinir, sum vóru so mikið ofta við, fingið 230 túsund krónur fyri sigrar, javnleikir og DM. Hetta er umframt føstu lønina og møguligar seravtalur, sum einstøku spælararnir hava við felagið um bonusskipanir.

Tað ljóðar av nógvum, og talan er um stórar upphæddir. Men skattatrýstið av síðst vunnu krónunum í Danmark hjá teimum, sum hava hesar lønirnar, man liggja um tey 60 prosentini og kanska hægri enn so. Tað vil siga, at kommunan og staturin fáa tilsaman meiri burturúr avtaluni, sum FCK hevur gjørt við Toda og liðfelagarnar, enn spælararnir fáa í sín part!

# NSÍ góða venjing í Danmark

**Venjarin sigur seg vera væl nøgdan við avrikini í teimum báðum venjingardystunum, sum NSÍ kortini tapti**

FYRIREIKING
*Jóannes Hansen*

Dreymurin hjá NSÍ er at vinna meistaraskapin. Í fjør vóru teir næstbestir, og teir í Runavík vilja fegnir fyri fyrstu ferð nakrantíð røkka eitt stig longri upp. Um hetta skal eydnast í ár, so er alneyðugt, at teir sunnudagin ikki tapa og helst vinna í Gundadali ímóti HB.

Í fyrradagin kom NSÍ aftur úr Danmark, har teir í Blokhus í Norðurjyllandi í eina viku hava fyrireikað seg til tey átta umførini, sum eru eftir av landskappingini og til fyrstu royndina í Europa Cup, sum verður 14. og 28. august, tá ið teir skulu spæla ávikavíst á útivølli og heimavølli ímóti norska Lyn.

Jógvan Martin Olsen, NSÍ venjarin, er stak væl nøgdur við venjingarnar og umstøðurnar, sum teir búðu, vandu og dystaðust undir í Danmark. NSÍ spældi tveir venjingardystir. Teir taptu báðu ferðirnar, men venjarin leggur ikki so nógv í tapini.

– Vit høvdu vant nógv, so spælararnir vóru ikki optimalt fyrireikaðir at spæla dystir. Vit spældu ímóti 1. deildarliðnum hjá Randers Freja, og tá taptu vit 5–2. Vit vóru á odda 1–0 við máli, sum Jónstein Petersen skoraði, men dygst undan steðginum fingu teir brotsspark, sum teir skoraðu uppá. Í sambandi við hesa støðuna varð Jens Martin Knudsen rikin av vøllinum, og tað sást sjálvsagt aftur í 2. hálvleiki, tá ið teir skoraðu fýra mál afturat, og Helgi L. Petersen skoraði eitt fyri okkum.

Hitt mótstøðuliðið skuldi eitast at vera U–23 liðið hjá superligafelagnum AaB, sum vann 2–0 ímóti NSÍ. NSÍ ferðalagið var næstsíðsta leygardag á Aalborg stadion, har teir sóu FCK við væl uppløgdum Toda Jónsson í álopinum vinna 2–0. Tá ið NSÍ so hitti U–23 liðið hjá teimum, vóru tríggir spælarar, sum høvdu verið við ímóti FCK, á liðnum, og harafturat vóru fimm fremmandir spælarar, sum í síðstu viku vóru í AaB og royndarvandu. Teir vóru sjálvandi ógvuliga uppsettir at vísa, hvør dugur er í teimum. Tveir vóru úr Brasilia, ein úr Belgia, ein úr Fraklandi og so var ein finni.

– Talan var um rættuliga tætta uppgerð, sum var fín dystarvenjing fyri okkara spælarar. Síðstu tólv minuttirnar skoraðu teir tvey mál. Í báðum førunum skoraðu teir eftir deyðbóltsstøður, sigur Jógvan Martin Olsen.



# Nógv útbúgvingarpláss eftir

**Seinastu dagarnar hava nógv fólk fingið svar frá donskum útbúgvingarstovnum um upptøku. Hóast svarið ikki var positivt, so eru nógvir møguleikar eftir. Í framtíðini verða miðnámskarakterirnir enn meira avgerandi**

ÚTBÙGVING
*Heri á Rógvi*



*Tað eru nógv útbúgvingarpláss tøk í Danmark á teimum ymsu lærustovnunum.*

*Tilvildarliga vald mynd*

Nógvir føroyingar hava seinastu dagarnar funnið brøv frá donskum útbúgvingarstovnum í postkassanum. Hesi brøv geva boðini um, hvørt ein næmingur er upptikin á hendan ella handan útbúgvingarstovnin.

Onkur er kanska sloppin in á dreymaútbúgvinga, men onnur sita kanska og ivast í, hvat nú er at gera.

Hagtølini hjá IvuC – sí www.ivuc.dk – siga okkum so mikið, at tað eru bert nakrar fáar útbúgvingar, sum krevja heilt nógv. 32 av teimum 706 upptøkuøkjunum krevja níggju ella meira í miðal. Tað eru nakrar útbúgvingar, sum bert eru fyri teir allar, allar bestu á miðnásmskúlunum, men møguleikarnir eru nógvir hjá teimum, sum kanska ikki í fyrsta umfari høvdu nóg nógv í miðal. Hetta er væl at merkja í sambandi við kvotu 1, har tað bert er tann einstaki miðalkarakterurin, sum er avgerandi.

### Søkja enn

Sosialurin kundi í síðstu siga frá, at hagtøl hjá Stuðulsstovninum siga okkum, at 91% av føroyingum, sum eru undir útbúgving uttanlands, lesa í Danmark. Tískil eru brøvini frá donskum útbúgvingarstovnum ella viðkomandi í hesum døgum.

Holger Arnbjerg, leiðari fyri Altjóða skrivstovuna og lestrarvegleiðari, sigur, at samanumtikið er tað vorðið lættari at sleppa inn á útbúgvingar í ár enn undanfarin ár, men í nøkrum førum er tað farið nógv upp.

Vit síggja tað eitt nú við læknaútbúgvingini, har miðalkarakterurin er farin heili 0,3 upp í mun til í fjør. Hetta vísir, at tað ikki altíð ber til at taka úrslitið frá undanfarna árinum sum givið, sigur Holger Arnbjerg.

Men gekk tað ikki við útbúgvingini, so eru fleiri møguleikar eftir. Yvirlitið hjá IvuC vísir, at heilt nógvar útbúgvingar hava tøk upptøkupláss. Er onkur áhugaður í einum tílíkum, so eru ráðini hjá Holger Arnbjerg, at fólk seta seg í samband við útbúgvingarstovnarnar og frætta, hvat skal til fyri at sleppa. Áðrenn 7. august skal søkjast gjøgnum KOT (Koordineret tilmelding) – sí www.kot.dk – og eftir hetta, um tøk pláss eru, so eru tað tey fyrstu, ið venda sær til útbúgvingarstovnin, ið verður upptikin, um tey nøkta atgongukrøvini.

Týdningarmikið er sjálvandi eisini at hugsa um aðrar umstøður, eitt nú bústað osfr.

### Meira Kvote 1

Danska útbúgvingarskipanin tekur upp til útbúgvingar eftir tveimum kvotum – eitt og tvey. Sum nevnt eru tað bert karakterir frá miðnámsskúlanum, sum eru avgerand í kvotu. Tann við lægst í miðal, sum er sloppin inn, er so tann kvotienturin, sum skal til fyri at sleppa inn. Men teir broytast eitt sindur. Og tað hevur altso mest at gera við útboð og eftirspurning.

Kvote 2 tekur í høvuðsheitum ymsar arbeiðs- og lívsroyndir við í metingina. Tað er í hvørjari einstakari útbúgving eitt býti millum, hvussu nógv verða tikin upp í hvørjari kvotu.

Danska stjórinin hevur greitt meldað út, at ætlanin er at økja um kvote 1 upptøkur og minka aðru kvotu tilsvarandi.

Stjórnin er áhuga í at fáa yngri fólk inn á útbúgvingar, og hetta fer at seta enn størri fokus á karakterir. Tað verður truplari at sleppa inn í tær væl dámdu útbúgvingarnar hjá teimum við ikki so góðum karakterum, men tað eru heilt einkult føri – møguleikarnir eru framvegis øgiliga nógvir, sigur Holger

Ráðini til tey, sum ætla at lesa til lækna ella líknandi, eru sjálvandi at vera fokuseraði frá fyrsta degi í miðnámsskúlanum, tí vendist illa aftur.



*Pauli Nielsen leggur dent á annað enn karakterir, tá hann velur út til Lærara- og pedagogskúlan.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Leggja dent á breiðar royndir

**Á Føroya lærara- og pedagogskúla leggja tey dent á aðrar royndir enn karakterir frá miðnámsskúlunum**

UPPTØKA
*Heri á Rógvi*

Pauli Nielsen, rektari á skúlanum, sigur, at tey hava ikki valt bert at skeita eftir karakterunum.

– Umráðandi er, at tú hevur breiðar royndir fyri at verða upptikin til pedagog ella lærara, sigur Pauli Nielsen.

– Ì veruleikanum verður tikið støðu til hvørt einstakt mál, sigur Pauli

Eini 240 fólk søktu í ár eftir teimum 48 plássunum til nýggjar pedagogar og lærarar. Hetta staðfestir ein stóran áhuga, men merkir samstundis nógva umhugsan hjá Paula og hinum, sum skulu taka støðu til, hvør skal sleppa inn.

Eg haldi, at tað er skeivt bert at hyggja at karakterum í miðnámsskúlanum, tí fólk

kunnu hava so nógvar aðrar eginleikar. Her á skúlanum eru fólk í ymsum aldri,

og eg meti, at tað styrkir skúlagongdina nógv, sigur Pauli Nielsen.

Pauli og hini, sum skulu taka upp, hyggja eftir ymsum royndum hjá fólki, og tað minnir eitt sindur um kvote 2 skipanina, men er ikki heilt tað sama.

Men tey við frálíkum miðnámsúrslitum sleppa inn, men eitt miðal undir átta nyttar ikki nógv á lærarar- og pedagogskúlanum.

## Topp 10 útbúgvingar

Hesir eru tær tíggju útbúgvingar, ið krevja mest í miðal í donsku skipanini. Tølini eru minsti miðalkarakterurin fyri at sleppa inn á útbúgvingina eftir kvote 1 í 2003. Útbúgvingar, ið velja næmingar út eftir øðrum metingum, eru ikki tiknar við í yvirliti. Ì klombrum standa nøvnini á býunum, har hesar útbúgvingar halda til.

Í sama viðfangi kann tað nevnast, at 32 av 706 upptøkuøkjum í Danmark krevja níggju ella meira í miðal.

**Sálarfrøði** (Keypmannahavn) . . . . . . . . . . . . . . . 9,8
**Retorik** (Keypmannahavn) . . . . . . . . . . . . . . . . . 9,7
**Medievidenskab** (Århus) . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9,7
**Læknafrøði** (Keypmannahavn) . . . . . . . . . . . . . 9,6
**Film- og medievidenskab** (Keypmannahavn) . . 9,6
**Antropologi** (Keypmannahavn) . . . . . . . . . . . . . 9,6
**Djóralækni** (Keypmannahavn) . . . . . . . . . . . . . . 9,6
**Stjórnmálafrøði / Samfelagsfrøði** (Keypm.) . . . 9,5
**Sálarfrøði** (Århus) . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9,5
**Klinisk Biomekanik** (Odense) . . . . . . . . . . . . . . 9,5

*Kelda: Berlingske Tidende*